# Skúlin er liðugur…

**Tey munnu vera mong, sum hava tikið teirra seinasta ár í onkrum skúla í hesum døgum. Tað eigur at verða feirað, og tað gera fólkaskúlanæmingar vanliga eisini. Í Ósáskúlanum í Klaksvík var tað nú gjørt heldur seinni enn vanligt í ár**

SKÚLI
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Vanliga hevur tað verið so á hvørjum ári, tá tær skrivligu próvtøkurnar hjá tíggjunda flokkunum í báðum skúlunum í Klaksvík hava verið lidnar, at so halda næmingarnir teirra seinasta skúladag. Og tað plagar at merkjast bæði so og so í býnum. Men í ár var heldur øðrvísi. Skúlarnir báðir hildu ikki dagin sama dag í ár. Hetta komst fyrst og fremst av verkfallinum á arbeiðsmarknaðinum, sum gjørdi tað ómøguligt hjá flokkunum báðum í Ósáskúlanum at hava alt teirra tilreiðar til tann uppruna-liga ætlaða dagin. So lærarar og næmingar gjørdu í felag av at útseta dagin til dagin fyri prógvhandanina.

So mikumorgunin, tá klaksvíkingar vaknaðu hoyrdust gass-floyturnar um allan býin, men tó ikki so væl, sum tær plaga, tí hesuferð var tað bert tann eini skúlin. Ósáskúlin var sum vanligt skrýddur við ballónum, og eitt heiðursportur varð somuleiðis gjørt.

Sagt varð í býnum tó, at hesir báðir tíggjunda flokkarnir mugu sigast at hava verið fyrimyndarligir, tí ikki hevði verið so nógv at hoyrt til teir um náttina. Okkurt árið hevur nærum ikki verið svøvnfriður fyri næmingunum, men neyvan man tað bila so nógv. Tí øll munnu minnast aftur á, hvussu glaður ein er, tá ein er liðugur í fólkaskúlanum, so um ein nátt rýkur burtur úr millum um árið, man tað ikki gera tað stóra.

Sosialurin fangaði hesi glaðu ungdómarnir, tá tey vóru á veg túr við lastbilinum kring býin. Tað er fastur táttur, tá fólkaskúlin er liðgur, at næmingar fara í lastina á einum bili og koyra so runt í býnum og kasta karamellir og bomm, meðan tey rópa og floyta av gleði. Tá hesin biltúrurin er av, fara tey flestu heim og eftir høvdinum í song deyðatroytt eftir at hava verið uppi í meira enn eitt samdøgur.

Munurin hesuferð er tó, at tey nú av sonnum eru liðug. Ongar próvtøkur at hugsa um, tí tær eru jú farnar aftur um bak.

– Vit halda, at framyvir átti seinasta skúladagur bara altíð verið, tá munnligu próvtøkurnar eru lidnar, tí tá eru vit ordiliga liðug. Tað er nógv betur, eru tey øll á einum máli um.

Hóskvøldið fingu tey prógvini handað frá skúlastjóranum Símun Petur Hjelm. Síðani stendur heimurin opin fyri teimum. Tey flestu fara helst víðari í miðnámsskúla, men nøkur fara uttanlanda at víðka teirra sjónarrring, meðan onnur fara at leita sær eftir arbeiði ella læruplássum.



*Mikudagin var seinasti skúladagur hjá tíggjunda flokkunum í skúlanum við Ósánna. Hetta bæði sást og hoyrdist aftur í býnum allan dagin, inntil tey deyðatroytt fóru av aftur lastbilinum og heim í song*

*Mynd: Jens K. Vang*


NORÐOYA SPARIKASSI

**Rentubroyting**

Í sambandi við at danski tjóðbankin tann 6. juni 2003 lækkaði diskontoina við 0,50%, verður hervið boðað frá, at Norðoya Sparikassi við gildi frá 28. juni 2003 hevur hesi høvuðsrentustig á inn- og útláni.

| | |
|---|---|
| **Innlán** | |
| Vanlig konto | 0,10% |
| Fíggjarkonto | 0,10% |
| 3 mðr. uppsøgn | 1,50% |
| 12 mðr. uppsøgn | 1,75% |
| 12 mðr. uppsøgn ábyrgdarar | 2,00% |
| Silvakonto | 2,25% |
| Gull 1 | 1,00% |
| Gull 2 | 2,25% |
| Bústaðarkonto *(herav 3% í stuðuli)* | 5,25% |
| Kapitalpensjón *(ongin rentuskattur)* | 2,75% |
| Ábyrgdarapeningur | 3,00% |
| **Útlán** | |
| *Bústaðarlán* | |
| 1. veðrættur | 4,25% |
| 2. veðrættur | 6,75% |
| *Billán* | |
| 50% útgjald | 5,25% |
| 25% útgjald | 6,25% |
| Onnur billán | 7,50% |

Nærri upplýsingar um rentustigini kunnu fáast við at venda sær til sparikassan.

Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík
Tel: 475000 Fax: 476000 Teldupostur: ns@ns.fo www.ns.fo

VASTI 457171


# Ælabogin á konsertferð í Noregi

**Orkestrið Ælabogin kom aftur av eini væleydnaðari konsertferð í Noregi mikudagin 17. juni**

KONSERTFERÐ
*Solby A. Eliasen*

Spenningurin var í hásætinum 2. hvítusunnumorgun, tá orkestrið Ælabogin var við, tá Norrøna legði frá landi í Havn til Bergens. Orkestrið skuldi til TREFF 03 í Tróndheimi í Noregi. Øll vóru sera spent upp á, hvussu hesin túrur fór at verða, tí tey høvdu jú bara spælt til tiltøk í Havn fyrr. So hetta at fara á uttanlandaferð at spæla var nakað heilt nýtt fyri øll.

Túrurin fekk eina avbera góða byrjan, tí hetta var tann fyrri harmonikutúrurin við Norrønu, og tey vórðu øll sera væl móttikin av øllum umborð. Tey spældu tvær ferðir umborð, og ferðafólkini tóku sera væl í móti teirra framførslum. Harafturat fingu tey eisini hjálp frá harmonikuspælarunum.

Tá tey vóru komin til Bergens gekk leiðin beinleiðis til Lerdal, har tey svóvu ta fyrstu náttina. Túrurin í bussi til Lerdal var í sær sjálvum eitt upplivilsi. Tey koyrdu ígjøgnum ikki minni enn einar 50 tunlar, har av ein teirra var 24 kilometrar langur.

Dagin eftir koyrdu tey víðari til Dombås. Landslagið var sera stórsligið at koyra ígjøgnum. Tey koyrdu um Hardagerviddda Jotunheimin, oman fyri træmarkið og har var kavi á vegnum.

Í Dombås búðu tey í smáttum, og har var gott at vera. Um kvøldið fóru tey á írsku pubbina ” Dirty Nelly”. Hetta var dagin, tá Føroyar spældu í móti Týsklandi á Tórsvølli, og eigarin av pubbini var so vinarligur, at hann fann dystin fram til tey á stórskíggja, so tey fingu høvi til at síggja dystin.

Hósdagin 12. juni hildu tey frí og nutu dagin í Dombås. Tey fóru ein túr inn í býin, í Trollparkina og heilsaðu upp á Dovregubban. Eisini svumu tey og sluppu ein túr á rossabaki.

### Fríggjadagur 13.

Fríggjadagin gekk leiðin so til Tróndheim. Og tað at hetta var fríggjadagur tann 13. skuldi av sonnum vísa seg hjá ferðalagnum. Tey skuldu koyra í einum bussi til Tróndheim. Túrurin varð mettur at taka umleið tríggjar tímar, men hann kom at varða nógv longur enn tað. Tey vóru so óheppin at koma at sita á einum steðgiplássi í fimm tímar umringaði at nógvum kúm. Hetta fingu hvørki bussførari ella vertir teirra í Tróndheimi gjørt nakað við, hóast tey royndu alt tað, tey kundu. Men føroyska ferðalagið tók hetta við góðum lagi, og tey komu til Tróndheims í tveimum mini-bussum kl. 17:30 um kvøldið bæði móð og troytt. Leygardagurin var tann stóri dagurin, sum tey høvdu ferðast so longi fyri at vera við í. Hann byrjaði við góðum veðri, og lagið var gott á øllum. Fyrst gingu øll orkestrini skrúðgongu gjøgnum býin, síðani varð stevnan sett á torginum, og Ælabogin vóru fyrst at framføra. Tey spældu á torginum fyri stórari mannamúgvu, sum klappaði dúgliga fyri teimum.

Av tí at hetta sama vikuskiftið var bæði bý-veitsla og Harley Davidson-treff, so máttu hini orkestrini spæla á einum øðrum torgi, men allar framførslurnar vóru væleydnaðar. Um kvøldið var stór veitsla við góðum dansi. Og er tað nakað hesi fólkini dugdu, so var tað at hugna og stuttleika sær til eina tílíka veitslu. Tey hildu á til midnátt, tá fóru øll heim.

Sunnudagin vóru tey og hugdu at Nidarrós Dómkirkjuni. Ein sera stórsligin og flott kirkja. Aftaná fóru tey til grillveitslu í Sverresborg, har onnur orkestur eisini vóru við. Seinni koyrdu tey aftur til Dombås, har tey fóru á pizzaria, áðrenn tey fóru í koyggjurnar á vallaraheiminum í Trolltun. Dagin eftir hildu tey leiðina fram til Lervik og síðani til Bergen og Norrønu.

Ferðalagið letur sera væl at túrinum. Og tey siga, at tey búðu sera væl og høvdu allar hentleikar. Eisini tá hugsað verður um fólk í rullustóli.

– Hetta hevur verið ein strævin, men stuttlig ferð í Noregi. Og vit vilja takka okkara stuðlum og Smyril Line fyri beinasemi í sambandi við ferðina, og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla, sum gevur okkum møguleika fyri at vera saman um tónleikin hvørja viku, sigur ferðalagið, sum var aftur í Føroyum í øllum góðum mikudagin í seinastu viku.



*Ælabogin slapp fyrst framat at spæla eftir, at stevnan var sett*

*Mynd: Hugo Leo*



UTTAN ÚR HEIMI

# Labour mist oddasessin

**Kríggið í Irak hevur fingið nógvar bretar at venda sær frá arbeiðaraflokkinum og Tony Blair, forsætisráðharra.**

BRETLAND
*Árni Joensen*

Fyri fyrstu ferð í fleiri ár vísir ein veljarakanning í Bretlandi, at tann konservativi andstøðuflokkurin hevur størri undirtøku millum veljararnar enn arbeiðaraflokkurin hjá Tony Blair, forsætisráðharra.

Kanningin, sum Daily Telegraph kunngjørdi í gjár, vísir, at hevði parlamentsval verið í Bretlandi nú, høvdu teir konservativu fingið 37 prosent av atkvøðunum og arbeiðaraflokkurin 35 prosent. Liberalu Demokratarnir høvdu fingið 21 prosent.

Kanningin er gjørd í døgunum frá 24. til 26. juni, og hon avdúkar eisini, at heldur ikki forsætisráðharrin sjálvur er so væl umtóktur longur. 34 prosent av teimum spurdu siga seg stuðla Blair. Í mai søgdu 38 prosent tað sama, í apríl 42 prosent, og fyri tveimum árum síðani fekk hann stuðul frá 52 prosentum av veljarunum.

Eygleiðarar í London siga, at høvuðsorsøkin til afturgongdina hjá Labour og Blair er, at bretar og amerikanarar framvegis ikki hava funnið nøkur hópoyðingarvápn í Irak. Júst hópoyðingarvápnini vóru høvuðsgrundgevingin fyri álopinum á Irak.

# Samkynd fingu viðhald




*Amerikanski hægstirættur hevur nú gjørt av, at samkyndir menn kunnu hava kynsliga samveru. Úrskurðurin kom í sambandi við eitt rættarmál í Texas, har tveir menn vórðu tiknir fyri at hava havt kynsliga samveru. Í fýra amerikanskum statum hevur tað verið bannað samkyndum monnum at hava kynsliga samveru, og í níggju statum umfatar forboðið eisini samkyndar kvinnur. Mett verður, at úrskurðurin hjá hægstarætti er ein týðandi sigur fyri rættindini hjá samkyndum í USA, og tey vóru eisini mong, sum fegnaðust um avgerðina.*

# Amerikanararnir ørkymlaðir - sfinna ikki oddafiskarnar

**Amerikanska umsitingin hevur eitt yvirlit við "ther most wanted men", men enn hava teir ikki funnið Saddam Hussein, Osama bin Laden ella Mullah Mohammed Omar, sum standa ovast á yvirlitinum.**

USA OG YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

- Sjálvt heimsins einasta stórveldi við heimsins mest framkomnu tøkni kann hava ilt við at finna hesar menn, sigur Charles Pena, sum er amerikanskur verjuserfrøðingur.

Í mars róku amerikanararnir irakska forsetan, Saddam Hussein, frá, men nú hálvan triðja mánað seinni hava teir framvegis ikki funnið hann. Í desember í 2001 segði George W. Bush, forseti, at hann vildi hava yvirgangsmannin Osama bin Laden "dead or alive", og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, segði sannførdur "we're going to get him". Men enn hava amerikanararnir ikki sæð nakað til bin Laden.

Mullah Omar var leiðari í afghanska Taliban-stýrinum, sum hýsti al-Qaeda, men hann slapp til rýmingar, tá USA og onnur lond lupu á Afghanistan í oktober í 2001.

Ein talsmaður hjá verjumálaráðnum Pentagon viðgekk fyri tíðindastovuni Reuters í gjár, at amerikanska stjórnarumsitingin er ørkymlað av, at eingin av teimum trimum er funnin enn.

Amerikanararnir halda, at bin Laden er í Afghanistan ella Pakistan, og at Mullah Omar fjalir seg í Kandahar ella Oruzgen í Afghanistan. Í Irak hava servandir amerikanskir hermenn leitað eftir Saddam Hussein, men uttan úrslit, og eingin iraki tykist vita ella vera sinnaður at siga, hvar hann er.

## Tørvur á nýggjum kapitali

Ein kanning hjá Den norske Bank vísir, at 29 prosent av teimum smáu og meðalstóru fyritøkunum í Noregi mugu fáa nýggjan kapital tey bæði næstu árini.

Leif Teksum, stjóri í DnB, sigur við Dagsavisen, at tann stóri tørvurin á nýggjum kapitali er eitt tekin um, at fyritøkurnar hava ov lítlan eginpening. Hann leggur afturat, at hetta er ein óheppin støða, tí í flestu førum er talan um júst tær fyritøkurnar, sum skulu skapa menning í samfelagnum.

Í norska arbeiðsgevarafelagnum ásannar búskaparfrøðingurin Tor Steig, at tað er ikki lætt at fáa fatur á nýggjum kapitali, og hetta er serliga galdandi fyri tær fyritøkurnar, sum framleiða vørur til útflutnings, og sum kappast við aðrar fyritøkur av sama slagi, sigur hann.

## Uppsagnarbræv við sær

150 av teimum 240 fólkunum, sum arbeiða á skipasmiðjuni Danyard í Aalborg, fáa eitt uppsagnarbræv við sær, tá tey fyrsta dagin fara í summarfrí.

Danyard byggir í løtuni eitt marglætisskip til eitt amerikanskt felag. Skipið kostar einar 500 milliónir krónur og verður liðugt um stutta tíð. Tá skipið er latið eigaranum, hevur skipasmiðjan onga bílegging eftir, og tí er einki annað at gera enn at koyra fólk til hús, sigur stjórin á Danyard, Torben Erikstrup, við Nordjyske Stiftstidende. Danyard tingast í løtuni við eitt felag um ein møguligan sáttmála, men ikki fyrr enn í august verður greitt, um nakað kemur burturúr.

Tey, sum ikki fáa uppsagnarbræv, skulu gera ymiskt viðlíkahaldsarbeiði umborð á nøkrum skipum hjá donsku sjóverjuni. Men sambært skipasmiðjustjóranum er hetta arbeiðið ikki so umfatandi, sum tað plagdi at vera, tí eisini danska sjóverjan er farin at spara, sigur hann.

## Tollararnir á festivali

Tann vælkendi Roskilde-festivalurin byrjaði alment hósdagin, men hesaferð eru tað ikki bara tónleikarar og tey, sum hava áhuga fyri tónleiki, sum eru á festivalinum.

Danska toll- og skattstovan er farin í hernað ímóti teimum, sum keypa og selja øl, sodavatn og rúsdrekka uttan at rinda tey almennu avgjøldini, og í tí sambandi halda bæði løgreglan og tollarar eyga við tí, sum verður selt á festivalinum. Sambært danska útvarpinum hava tollararnir longu funnið nógvar kassar av øli og nakað av rúsdrekka, sum var farið uttan um almennu avgjaldsskipanina.

Tey, sum gera sær dælt av at selja atgongumerki á svarta marknaðinum, hava eisini havt jól og góðar dagar í Roskilde seinastu dagarnar. Skalt tú til allar tær 150 konsertirnar á festivalinum, kostar eitt lógliga keypt atgongumerki 1.100 krónur, men seinastu dagarnar hevur prísurin ligið um 3.000 krónur á svarta marknaðinum.

## Sleppa aftur at flúgva

Herfyri settu bretsku myndugleikarnir øllum bretskum flogfeløgum forboð fyri at flúgva til tveir býir í Kenya, høvuðsstaðin Nairobi og tann væl umtókta frítíðarbýin Mombasa.

Orsøkin til forboðið var óttin fyri yvirgangsatsóknum frá víðgongdum muslimskum felagsskapum, men nú sleppa bretsk flogfør aftur at flúgva til Nairobi. Flutningsmálaráðið í London sigur, at trygdarviðurskiftini eru bøtt munandi í kenyanska høvuðsstaðnum.

Hinvegin sleppa bretsk flogfør ikki at flúgva til Mombasa, tí har eru trygdarviðurskiftini framvegis ikki í lagi, men væntandi koma tey skjótt í rættlag, sigur flutningsmálaráðið í London.